

Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur, og Anna Dalsgaard, lærari

# Kærkomin bók til **tannáringin**

*Kroppur, kenslur og kynslív* er handbók til tannáringin um allar hugsandi spurningar, tannáringurin hevur um tað, sum hendir í hesum týdningarmikla tíðarskeiðinum í lívinum.

Tekstur: Turið Kjølbro

SAMRØÐA. Fyrst í mai kemur bók út á føroyskum, ið eitur *Kroppur, kenslur og kynslív*; tað Nathalie Simonsson, ið er ráðgevi í kynslívi, sum hevur skrivað, og Anna Dalsgaard, lærari, sum hevur týtt; Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur, hevur ráðgivið í tilgongdini at týða og laga bókina til føroyskt; umframt hava 4 ungfólk, tvær gentur og tveir dreingir, í aldrinum 15–18 ár lisið og viðmerkt.

Eingin slík bók hevur verið á føroyskum; tískil hava lærarar og heilsufrøðingar brúkt útlendskt tilfar, tá ið undirvíst hevur verið í til dømis kynsbúning og kynslívi.

– Hetta er ein ógvuliga kærkomin bók; tá ið eg havi undirvíst, havi eg brúkt danskt lýsingartilfar og danskar faldarar, og tað hevur á ongan hátt verið nøktandi. Eg havi víst á tørvin á eini bók sum hesari á føroyskum í nógv ár, sigur Bjørghild Djurhuus, sum hevur drúgvar royndir sum heilsufrøðingur.

Bjørghild Djurhuus heldur, at tað besta við hesi bókini, er, at hon ger líka nógv burtur úr kenslulívinum hjá dreingjum sum gentum.

– Í bókum av hesum slagi verður vanliga nógv gjørt burtur úr kenslulívi og ymiskum, sum gentur fara ígjøgnum í kynsbúningini. At henda bók tekur dreingirnar við á jøvnum føti sum genturnar, eri eg sera fegin um. Bókin svarar øllum hugsandi spurningum í einari og somu bók.

Anna Dalsgaard, sum hevur lívfrøði sum linjulestur á læraraútbúgvingini og drúgvar royndir sum lærari, sigur, at tað hevur verið ein avbjóðing at týða bókina úr svenskum til føroyskt.

– Vit hava ikki so nógv orð á føroyskum, tá ið talan er um kroppin, kenslur og kynslív; í fleiri førum havi eg tosað og kjakast við fólk, eg kenni, eisini ung, um ymiskt í bókini, fyri at lýsa og orða tað rætt. Hetta hevur verið ómetaliga spennandi, mennandi og krevjandi. Meðan eg havi týtt, havi eg fleiri ferðir tikið meg sjálva í egnum fordómum, sum eg ikki var greið yvir, at eg hevði. Tískil havi eg lært nógv um ótilvitaðar hugsanir um eitt nú seksualitet.

Bókin nemur við viðkvom evni, og eisini evni, vit ikki eru von við at lesa um á føroyskum; hvussu heldur Anna Dalsgaard, at børn og ung fara at kenna seg aftur í bókini?

– Tað er vælkent, at tað koma tíðarskeið í uppvøkstrinum, har kroppur og sinni broytast serliga nógv. Broytingar, sum kunnu kennast øgiligar hjá summum og fyri onnur fara framvið uttan hóvasták. At tú sum barn ella ungdómur nú fært møguleika at lesa og kunna teg á føroyskum um stórar spurningar og evni, sum kunnu vera trupul at tosa við vaksin um, er ein gáva. Eg vænti, at børn og ung fara at fáa svar upp á nógvar stórar, truplar og tungar spurningar. Tey fara at síggja seg sjálv í øðrum ljósi, tá tey gerast greið yvir, at tað, tey kanska ímynda sær bert hendir fyri tey, er heilt vanligt. Eg vænti eisini, at bókin kann vera við til at bróta niður tabu. Tá børnini og tey ungu gerast varug við, at tey eru ikki einsamøll við tonkum og kenslum, kann henda, at tey gerast meiri opin og tora at tosa við onnur um hevi viðurskifti.

*Kroppur, kenslur og kynslív* er væl egnað til teirra, ið eru á veg inn í kynsbúningarárini; tað vil siga gentuna og dreingin í 8. flokki og eldri. Sambært fólkaskúlalógini er heilsukunnleiki og seksualupplýsing eitt av kravdu undirvísingarevnunum, sum lærarar skulu undirvísa í. Tað stendur ikki tilskilað, á hvørjum floksstigi.